# Sorin farin av landinum

Rumenski leikarin hjá EB/Streymi, Sorin Anghel, er farin av landinum. Hann verður ikki við til útivallar dystin móti B36, og ei heldur til heimadystin móti Manchester City. Hóast tey í Sundalagnum ivaleyst harmast um hetta, kunnu tey kortini gleðast um ørindini hjá Sorin Anghel í heimlandinum. 19. juni skal hann nevniliga giftast við unnustuni Alina Olaru, sum farna kappingarár spældi hondbólt við Tjaldrinum, eftir at hava verið fleiri ár hjá Stjørnuni. Leygarkvøldið eftir dystin móti ÍF, var skipað fyri eini hugnaløtu, ella polterabend, fyri Sorini í EB-húsinum, har eisini hendan myndin stavar. Búnin Sorin er 80 ár gamal, og er talan um gomul EB-klæðir.



# Brøndby styrkir seg

Í morgun boðaði mótstøðuliðið hjá B36 í UEFA-Cup, Brøndby, frá, at sáttmáli er gjørdur við svenska miðvallarleikaran Alexander Farnerud. Hesin gjørdist meistari við týska liðnum VfB Stuttgart farna kappingarár, og hevur áður spælt við Racing Strasbourg og Landskrona. Nú hevur sviin so gjørt ein fýra ára sáttmála við Brøndby. Sambært Ekstrabladet hevur Alexander Farnerud spælt fýra landsdystir og 35 U21 landsdystir, umframt at hann varð kosin ársins talent í Svøríki.

# Biðja til veður-gudarnar



*Í hesum døgum verður reyða renniundirlagið lagt á Tórsbreyt*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

**Veðrið kemur at avgera, hvørt leikvøllurin til frælsu ítróttina verður liðugur á ólavsøku**

FRÆLS ÍTRÓTT
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað verður arbeitt nátt sum dag á Tórsbreyt, nýggi leikvøllurin til frælsu ítróttina. Hetta fyri at halda málsetninginum um, at vøllurin skal vera klárur at taka í nýtslu á ólavsøku í ár – eitt ár seinni enn upprunaliga ætlað.

Beint nú verður reyða renniundirlagið lagt á, men tað skal límast, og setir krøv til turt og gott veður.

– So leingi veðrið er gott, og tað er tað í løtuni, koma vit at halda málsetninginum, um at taka vøllin í nýtslu sunnudagin 27. juli, upplýsir borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Heðin Mortensen. Men hvørki hann ella nakar annar kann veita vissu fyri turrveðri, og tískil verður biðið til veðurgudarnar um, at hetta heldur sær.

– Tað kemur at vera í síðstu løtu, men tað skal vera liðugt til ólavsøku, ger Heðin Mortensen greitt.

Hann ímyndar sær, at vøllurin verður tikin í nýtslu við einum hátíðarhaldið, har fólk leita sær framvið á Tórsbreyt. – Tað er einki fastlagt enn, men tað er upplagt at fáa Bragdið og rennikappingina knýtta upp í hetta tiltak, heldur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

hvør sítt. At spæla í Spania og Føroyum er sanniliga eisini hvør sítt. Tí er freistandi at spyrja, um tað ikki er eitt afturstig at verða í føroyskum fótbólti. Tað heldur Rodrigo hinvegin ikki.

- Eg siggi alt sum ein møguleika at menna meg. Eg læri nógv av hesum, og avbjóðingarnar eru nýggjar í sjálvum fótbóltsspælinum. Eg valdi Klaksvík og Skandinavia framum fleiri tilboð, sum eg hevði úr Asia, sigur brasiliumaðurin. Hann vísti eisini aftur einum felagið í Kina, sum kom við góðum boði, tá hann hevði verið í norðuroyggjum í tvær vikur. Tí sum hann sigur: Nú er hann í Klaksvík.

### Líkist Noregi

Umstøðurnar í Føroyum eru ikki heilt ókendar fyri hugflogsríka brasiliumannin. Fyri trimum árum síðan var hann við at lyfta Sandefjord upp í bestu norsku deildina. Hann hevði torført við at vinna sær pláss í byrjunaruppstillingini, og tíggju ferðir var hann innskiftur gjøgnum kappingarárið.

Tann tá 23 ára gamli Rodrigo Silva var rættiliga einsamallur í Noregi. Longsulin eftir heimlandinum gjørdi sítt til, at hann í 2006 vendi nøsini aftur til Brasilia. Har hevur hann hildið til seinastu árini.

- Føroyskur fótbóltur líkist nógv tí norska. Tað verður ikki lagdur nógvur dentur á, hvat tú dugir við bóltinum. Heldur eru tað nærdystirnir og takklingarnar. Tað visti eg væl áðrenn, og tað er ein avbjóðing. Eg eri eisini so smátt vandur við tað nú, sigur 25 ára gamli Rodrigo Silva.

